# Kunning á Summarfestivalinum




## Um ferðsluna

Meðan festivalurin er, eru hesir vegir stongdir fyri almennari ferðslu: Biskupsstøðgøta yvir til Skúlaveg, eystari partur av Vágstúni, við Sandin, Bøgøta niðan til Fosságøtu, Gerðagøta niðan til Jógvan Waagsteinsgøtu og niðankoyringin frá ferjuleguni á Stongunum.

Merkt er við myrkagráum, har ongin ferðsla er loyvd. Brúni liturin sigur frá, har ongin parkering er loyvd.

Allar leiðir hjá Bygdaleiðum stegða á Skúlavegi og við Bátabrúgvarnar.

Stóru parkeringsøkini kring býin eru merkt við gulum.

## Báta-, tjaldingar- og campingpláss

Tjaldingarplássini eru merkt við reyðum:
úti í Grøv, á Gerðabø og við KFUM & K.

Campingplássini eru merkt við grønum:
við ferjuleguna, niðanfyri býráðshúsið og á Kósini norðanfyri smiðjuna.

Bátaplássini eru merkt við bláum:
við Bátabrúgvarnar, á Stangabrúnni og heimanfyri Stórubryggju.

Klaksvíkar Kommuna hevur sett wc-vognar upp í miðbýnum, við Bátabrúgvarnar, á Akursmørk og við Borðoyarvík.

- Bilferðsla ikki loyvd
- Ongin parkering
- Tjaldingarpláss
- Bátapláss
- Parkering
- Campingpláss

Klaksvíkar Kommuna | Postboks 2 | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík | Tel. 410000 | Fax 410001 | www.klaksvik.fo